Summarkapping 2007

# Friðstaðurin mitt í London

**Hyde Park og Kensington Gardens eru tvær friðarligar náttúrulundir mitt í London, har tú kanst ganga túr og sleppa eitt sindur burtur úr allari strongdini, sum vanligi dagurin í London hevur at bjóða**



*Túrurin í Hyde Park og Kensington Gardens mitt í London var sera góður. Her fingu vit fyri fyrstu ferð møguleikan veruliga at taka okkum av løttum í London.*
*Mynd: Teitur Joensen*

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

London kann í mangar mátar vera ein strævin býur at ferðast í. Ofta veitst tú ikki heilt, hvar tú ert staddur, har eru fólk í øllum heraðshornum, og so koyra túsundtals bilar á stóru gøtunum í býnum.

Nógvar av løtunum í London verða eisini ofta brúktar inni í handlum – bæði dýrum og bíligum. Tá tú hevur gingið runt í dagavís á henda hátt við fleiri posum í hondunum, sum eru fullir av klæðum, skóm ella øðrum, so kann tað skjótt henda, at tú onkran dagin fært brúk fyri eini fríløtu, har tú sleppur frá øllum meldrinum í býnum.

Eisini í slíkum førum hevur London støð, har tú rættiliga kanst slappa av. Millum best umtóktu støðini til júst hetta, eru Hyde Park og Kensington Gardens, sum eru tvær lundir, sum liggja at kalla lið um lið.

## Hyde Park

Vit búðu á einum hotelli í Queensgardens, sum er rættiliga tætt við Hyde Park og Kensington Gardens. Tá vit ætlaðu okkum ein túr í lundina, gingu vit inn ígjøgnum Lancaster Gate. Lancaster Gate liggur á leið mitt í felagsparkini, og um tú fert í ein eystan, tá tú ert komin ígjøgnum Lancaster Gate, so endar tú í Hyde Park, meðan Kensington Gardens liggur vestaru megin.

Hyde Park er ein av størstu lundum í London, og hon er eisini partur av kongaligu lundunum í býnum. Lundin verður í nógvum førum nýtt til stórar mótmælisgongur, har fólk m.a. mótmæla hernaðarmálum.

Hyde Park er annars serliga kend fyri sítt Speaker's Corner, sum er í horninum, sum vendir ímóti tí kenda Marble Arch. Her kann ein og hvør, sum hevur hug, fara inn í Speaker's Corner at siga sína hjartans meining um tað, hann vil.

Hyde Park hevur eisini fleiri ferðir verið karmur um risastórar konsertir, og millum teir kendu bólkarnar og solistarnar, sum hava spælt her, kunnu nevnast

## Kensington Gardens

Er tað friðarligt og hugnaligt at spáka í Hyde Park, so er Kensington Gardens enn meir friðarligt og hugnaligt. Kensington Gardens er eisini ein av kongaligu lundunum í London. Tá ið vit komu inn í Kensington Gardens, gingu vit ein túr vestaru megin vatnið, The Serpentine. Sólin skein av einum klárum himmalhválvi, og túsundtals fólk gingu túr við børnum ella hundum.

Tá vit høvdu gingið eina løtu, komu vit til Princess Diana Memorial Fountain, sum er eitt lítið øki við einum serliga hugnaligum gosvatni, sum er til minnis um Dianu Prinsessu av Wales. Her sótu nógvar barnafamiljur og ótu matpakka, meðan onnur hugnaðu sær kring vatnið.

Seinni gingu vit víðari fram við vatninum, og úti á vatninum hugnaðu fólk sær í súkklubátum, sum til bar at leiga hinumegin vatnið.

Túrurin í Hyde Park var ótrúliga góður, og her fingu vit fyri fyrstu ferð møguleikan veruliga at taka okkum av løttum í London. Tú hugsaði ikki um handlarnar, bilarnar og alt fólkið, sum gekk runt inni í býnum. Nei, her hugsaði tú bara um ta fjálgu sólina, vatnið við teimum mongu súkklubátunum og svanunum, og øll tey fólkini, sum eins og vit gingu og hugnaðu sær henda vakra sólskinsdag.







Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari